KLAKSVÍKAR KOMMUNA
Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001



**Ár 2019, hin 21. feb. kl. 15:00 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:**
Jógvan Skorheim, Beinta Klakstein, Andras Róin, Sigmar Jacobsen og Marjun W. Thomassen.
**Ikki møtt:** Gunvá við Keldu.

**33.**
**Avhending av veghæddini og íbúðunum - Biskupstorg**

KráarN15-02-2019:
Vísandi til løgfrøðiligt notat frá Jógvani Páll Lassen, advokati, dagfest 19. februar 2019, og notati við fíggjarligum útgreiningum frá Andrasi Róin, stjóra á Bústøðum, og Tummasi T. Eliasen, kommunustjóra, dagfest 20. februar 2019, samtykkir nevndin:
*at Klaksvíkar kommuna yvirtekur veghæddina í Biskupstorg við tilhoyrandi hølum í kjallarahæddini fyri eina upphædd á 15 mió. kr., eftir at hædd er tikin fyri innskotspartinum hjá kommununi í sjálvsognarstovninum
*at Bústaðir yvirtaka leiguíbúðirnar í Biskupstorgi við tilhoyrandi hølum í kjallarahæddini, umframt rættindi til nýtslu av høli til húsavørð, fyri eina upphædd á 62 mió. kr., eftir at hædd er tikin fyri innskotspartinum hjá Bústøðum í sjálvsognarstovninum.

**Fundurin lokin kl. 15:45**